# Veruligu syndararnir ganga fríir

**Tað er skeivt at leggja gággufiskararnar undir at breiða sjúku á føroysku firðunum, tá vit vita, at veruligu syndararnir eru alararnir, sigur ein teirra, sum eigur gággurúsur á Oyndarfirði**

HAVDÁLKING
*Edvard Joensen*

– Veruligu syndararnir á Oyndarfirði eru ikki teir,sum hava nakrar gággurúsur standandi á firðinum. Tað eru alararnir, sum dálka fjørðin, sigur ein teirra, sum hevur fiskað gággur á Oyndarfirði.

Jákup Joensen úr Leirvík, heldur, at tað var at skjóta við síðuna av, tá Sosialurin í seinastu viku umrøddi gággufiskiskapin á Oyndarfirði í samband við, at fjørðurin er stongdur.

Hann sigur, at hansara gággurúsur hava staðið uttarlaga í firðinum. Umleið einar 500 metrar frá næsta aliringinum, har tær hava verið næstar. Fyri bara einum tveimum-trimum árum síðan, stóðu tær tætt undi ringunum, og tað bar væl til. Men í dag er so eiðasørt, at gágga livir í námind av aliringunum. Og tað kemst eina og aleina av, at har er so skitið.

–Tann bera skræpa, sigur Jákup Joensen. Øll tann evjan, sum fellur frá alinginì, legst á botnin, og tað er ikki tespiligt, tá ein rúsa kemur í tað avfallið. Tað er ikki fyri særtar næsar, sigur hann.

So tað er í hansara hugaheimi eingin ivi um, hvør tað er, sum hevur ábyrgdina av, at sjúka er á føroysku firðunum. Tað eru í hvussu er ikki gággufiskararnir, er hann ivaleysur í.

Sjálvur hevur hann verið burturstaddur nakrar dagar og hevur tí ikki verið á Oyndarfirði seinastu tíðina.

Seinastu ferð, hann dróg rúsurnar, tveitti hann tær bara tómar útaftur og ætlaði so nú at fara at koyra agn íaftur.

Men nú er fjørðurin stongdur, so hann sleppur ikki til tær aftur, sigur hann.

–So tað var ein lort støða, hendan skrivingin setti meg í. Eg ætlaði at byrja aftur at rógva út, men nú fái eg ikki agn, sigur Jákup Joensen, útróðrarmaður í Leirvík.



*Vestborg siglir regluliga millum Oyndarfjørð og Funningsfjørð við sjúkum Laksi, sum skal takast*

*Mynd: Edvard Joensen*

## Aðrastaðni frá

Jákup Joensen sigur, at tað er í hansara verð eingin ivi um, at smittan er komin aðrastðani frá til Føroya við eitt nú farmaskipum, sum sigla millum londini. Men ikki uttan á skipunum kortini. Tí tað, sum heftir seg á skipið, verður vaskað avaftur, meðan skipið siglir millum londini.

Hinvegin eru smá farmaskip, sum regluliga sigla millum eitt nú Fuglafjørð og útlendskar havnir, sum eisini liggja tætt upp at alibrúkum.

Skipini fara av Fuglafirði við farmi og koma viðhvørt tóm heimaftur. Tá er bara eitt at gera, og tað er at taka ballast. Tað er vanliga sjógvur.

Nú vita vit, at eitt nú ILA smitta hevur verið rundan um okkum í mong ár. So rímiligt er, at sógvurin, sum tikin verður inn, er smittaður. Tá tangin so verður tømdur aftur í Føroyum, er nærliggjandi at hugsa, at smitta kann fylgja við.

–Tað undrar ikki meg eitt einasta petti, at smittan fyrst varð ávíst á Fuglafirði, sigur Jákup Joensen. Tí tað er har, tey flestu skipini koma.

## Eisini í Føroyum

Men eisini her millum oyggjarnar sigla skip, sum flyta sjógv, vísir hann á. Og tað er so galið, at eitt teirra siglir regluliga út og inn av Oyndarfirði við sjúkum fiski og sjógvi.

Vestborg flytir sjúka laksin av Oyndarfirði á Funningsfjørð, har hann verður tikin.

–Og at hon eisini kann flyta eitt sindur av smittu, er ikki óhugsandi, heldur Jákup Joensen úr Leirvík.

Hann vísir á, at laksurin skal hava sjógv at svimja í, meðan siglt verður. Og tann sjógvurin verður væl sakt-ans tikin inn saman við laksinum, heldur hann. Tá er stórur møguleiki fyri at fáa sjúkan sjógv.

Eisini skal hesin sjógvurin skiftast í heilum, fyri at fiskurin ikki skal kvalast. Tá so nýggjur sjóvur verður tikin inn, fer tann brúkti útaftur.

Hvar fer so møgulig smitta tá? spyr útróðrarmaðurin og gággufiskarin úr Leirvík.

# Verri enn í fjør

**Fíggjarliga royndist ólavsøkan Tórshavnar Ítróttarráði nógv verri, enn hon gjørdi í fjør**

ÓLAVSØKA
*Edvard Joensen*

Tað stóð púra einki til hjá Tórshavnar Ítróttarráði í Kommunuskúlagarðinum ólavsøkudag. Básar koppaðu, dansitjaldið hótti við at fara í luftina, og fólk brúktu ikki pengar.

Nei, formaðurin í Torshavnar Ítróttarráð, Kristianna Høgnesen, veit ongar fíggjarvánir satt at siga mær, tá ringt verður at fregnast, hvussu gekst.

Hon sigur, at ólavsøkudagur miseydnaðist fullkomuliga hjá Ítróttarráðnum. Inntøkan var einar 300.000,- krónur minni, enn hon var í fjør. Og tað verður so tað minni at luta út til feløgini í Ítróttarráðnum, sigur hon.

Hinvegin var ólavøskuaftan rættiliga góður. Sum ein vanlig ólavsøka plagar at vera, sigur Kristianna Høgnesen.

Sjálvandi verða so eisini færri vinningar lætnir, tá eingin er at keypa. Teir kunnu so latast innaftur, og tann peningurin verður spardur, vísir hon á.




*Illveðrið gjørdi rættiliga um seg í Kommunuskúlagarðinum, og sløkkiliðið noyddist at koma til hjálpar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hon sigur seg ikki hava upplivað slíka ólavsøku fyrr. Tríggir básar fóru fyri einki, so har kom eingin inntøka ólavsøkudag.

Tað vóru - nær sagt sum vanligt - teir nýggjaru básarnir, sum vórðu oyðilagdir. Lætt tilfar. Pinnaverk og dúkur. Meðan gomlu træbásarnir eisini kláraðu at yvirliva hesa ólavøskuna.

–Teimum sást einki á, sigur Kristianna Høgnesen.

Støðan var rættiliga hættislig í Kommunuskúlagarðinum ta einu løtuna, tá stóra dansitjaldið stóð og hótti við at fara í luftina. Og ikki var hugsandi um hjá teimum, sum hjá vóru, at gera nakað.

Men einir tíggju sløkkiliðsmenn komu á staðið, og teir fingu tamarhald á støðuni og bjargaðu tjaldinum, greiðir Kristianna Høgnesen, formaður í Tórshavnar Ítróttarráð, frá.

Ringa veðrið gjørdu, sum vera man, at fólk komu ikki í býin. Og ivaleyst er nógv bygdafólk eisini farið heimaftur, heldur hon.

Men tað kundi fyri so vítt næstan gera tað sama, tí tað er einki stuttligt at standa við ein tivolibás í slíkum líkindum. Eitt nú royndu tey at hava hoppiborgina, sum børnunum dámar væl, opna. Men har gjørdist einki fyri regni.

Annars harmast Kristianna Høgnesen um, at tað stendur so illa til við drykkjuskapi millum heilt unga fólkið.

–Tað var beinleiðis óhugnaligt at síggja 12-15 ára gomul børn ganga full, meðan konsertin var, sigur hon.

–Tað er nú eitt. Men so at vera vitni til, at foreldur, sum verða boðsend at koma eftir einum avdotnum 13 ára gomlum barni, bara góðtaka tað soleiðis meira ella minni, er upp aftur verri.

– Tá mugu vit bara ásanna, at tað veruliga eru foreldrini, og ikki børnini, sum eru trupulleikin.



# Vinnarar og taparar

**-Vinningurin er eitt tap — tapið er ein vinningur. Tað merkir, at um vit skulu fáa sigurskransin, so mugu vit tapa valdið á okkum sjálvum og á okkara egna lívið, segði Hans Eiler Hammer í ólavsøkuprædikuni.**

ÓLAVSØKUPRÆDIKA
*Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Teksturin til ólavsøkuprædikuna var Matteus í 16 kapitli, ørindini 24 - 27. Hesin tekstur verður nýttur á øðrum hvørjum ári, og tað er ymiskt, hvat prestar fáa burturúr.

Tað var sum øllum kunnugt Hans Eiler Hammer, sum fekk tillutað at halda ólavsøkuprædikuna. Hans Eiler er sóknarprestur í Norðoyggjum, men tað kann ikki sigast, at hetta merkti prædikuna í ár. Heldur var tað ítrótt, sum var eitt afturvendandi tema í røðuna, og vóru flestu dømini grundaði á ymiskt innan ítróttina.

-Eg valdi heldur at leggja dent á ítrótt enn at lyfta peikifingrar og kritisera eitt nú aðrar prestur. Eisini haldi eg, at ítrótturin eigur eitt pláss í hesari prædikuni, tí hetta er jú so nærliggjandi serliga á ólavsøku, sigur Hans Eiler Hammer.

## Eingin serlig fyrireiking

Ólavsøkuprædikan er uttan iva tann prædikan í Føroyum, sum hevur flestar áhoyrarar, og hetta er eisini tann prædikan, sum fær mestu umtaluna - bæði áðrenn og aftaná. Hetta hevur tó ikki nervað Hans Eiler Hammer nakað stórvegis.

-Eg haldi ikki, at eg hugsaði nakað serligt um, at hetta var ólavsøkuprædikan, og man henda prædikan líkjast hinum prædikunum hjá mær, sigur Hans Eiler Hammer.

Um uppihaldið hjá Hans Eileri í Múla hevur havt nakra ávirkan á prædikuna er ikki gott at vita, men tað ljóðaði, at okkurt brotið skuldi skrivast í toftunum í Múla.

-Eg valdi ikki at brúka prædikuna sum ein peikifingur, sigur Hans Eiler Hammer.

Tað skal eisini sigast, at røðan ikki bar brá um persónligt ak ella partapolitiskt framfýsni. Krossberarin fekk tillutað ein rættiligan høvuðsleiklut, og hesum tekur Hans Eiler eisini undir við.

-Tí tað at verða ein Kristi krossberari, merkir at geva honum ræði yvir lívi sínum! Ja tað merkir at siga deyðadómin yvir seg sjálvan, yvir sína sjálvgleði og yvir sín stoltleika!, segði Hans Eiler í ólavsøkuprædikuni.

-Eg royndi eisini at lýsa, hvat tað merkir at vera krossberari, sigur Hans Eiler.



*Hans Eiler Hammer prædikaði ólavsøkudag. Hann legði dent á sambandi millum vinnarar og taparar.*

## Breið

Sum áður nevnt, so man hetta vera tann røðan, ið fær mestu umtaluna í Føroyum. Sjálvur sigur Hans Eiler, at tað ikki hevur ávirkað hann, og at hann hevur skrivað prædikuna júst sum hann plagar at skriva aðrar prædikur. Í øllum førum, so var boðskapurin í prædikuni rættiliga almennur, og vendi prædikan seg til ein rættiliga breiðan skara.

Prædikur verða skrivaðar við støði í einum teksti, og innihalda prædikur bæði viðgerð, tulking og sjálvandi eisini eina niðurstøða ella boðskap, hóast boðskapur so at siga longu er skrivaður.

Reyði tráðurin í prædikuni hjá Hans Eileri var sambandi millum vinnarar og taparar, og er hetta evnið ikki lítið hóskandi til ólavsøku.

-Vinningurin er eitt tap — tapið er ein vinningur. Tað merkir, at um vit skulu fáa sigurskransin, so mugu vit tapa valdið á okkum sjálvum og á okkara egna lívið, segði Hans Eiler í prædikuni.

Styrkin hjá Hans Eileri, sæð í almennum sjónarhorni, er, sum hann eisini sjálvur sigur, at dømini eru tikin burturúr dagligdegnum og ítróttarheiminum. Hetta hóskar óføra væl til - uttan at siga, at hetta er einasti og besti háttur at gera tað.

Boðskapurin í prædikuni minti áhoyraraskaran á, at størsti og endaligi sigurin er gjøgnum Jesus. Hann verður í prædikuni kallaður fyri hin størsti taparin av øllum, tí hann lat seg ofra fyri syndum okkara.

Dømini stiðja sum áður nevnt væl, men Hans Eiler lat tó ongan iva verða um hvør boðskapurin var:

-Tí tað snýr seg, fyri hvønn einstakan av okkum, um tað æviga lívið, frelstur um ævir frá ævigum deyða og glatan. Tí tað finst nevniliga ein annar møguleiki, og tað er at tapa lívið á mállinjuni. Tí tað er bert tann, ið heilt og fullt hevur givið sítt lív til Jesus Kristus, ið fær sigurslønina tá menniskjusonurin kemur!

Tað sigast, at tað er ikki ætlanin at sita og meta um, hvørt hetta er ein nøktandi prædika ella ikki, t.e. hetta er ikki nakað ummæli. Tað er tó nú einaferð soleiðis, at ólavsøkuprædikan er ein partur av ólavsøkuni, og hetta eru ikki tey ringastu orðini at leggja sær í geyma hesa vátu tíð.



*Bispur, landsstýrismenn, løgtingsmenn og prestar lýða á prædikuna hjá Hans Eileri.*

## Bergur næstu ferð

Sum vanligt er ólavsøkudag, so vóru prestarnir kring landið til døgurða hjá bispi. Sambært Hans Eileri, so er hetta ikki eitt forum, har ólavsøkuprædikan verður kjakast um. Heldur er hetta eitt høvi at hittast, og tað er heldur presturin, sum komandi ár fer at halda ólavsøkuprædikuna, ið fær ein høvuðsleiklut við borðið hjá bispi.

Næsta ár verður Bergur Debes Joensen av Argjum og sóknarprestur í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi, sum fer at prædika, tá tjóðarhátíðin aftur stendur á skránni.